# Omanlop við Dalsvegin



Stutt fyri jól varð omanlop við Dalsvegin, og nú er aftur galið. Mánamorgun leyp við Dalsvegin, og Landverk fór beinanvegin í gongd við at arbeiða uppá trupulleikan.

Tað er koyrandi um vegin, tí lopið blokerar ikki sjálvan vegin, men byggjast skal upp undir framvið vegnum. Vegna arbeiði er vegurin stongdur týsdag frá 13-16. Tað var ikki gjørligt at fáa viðmerkingar frá Landsverki áðrenn evstamark á blaðnum

# Kinesarar eiga eisini at smakka føroyskan fisk

Menningarstovan fer møguliga at skipa fyri handilsferð til Kina. Endamálið er at fáa í lag samstarv um útflutning og ráðgeving

– Skulu føroyingar fara inn í størri handilssamstarv við kinesarar? Skal úrslitið verða so, at kinesarar fara at seta føroyskan fisk á borðið?

Tað er sjálvandi ringt at spáa um framtíðina. Men Menningarstovan ætlar so í øllum førum ikki at liggja á latu síðuni, tá talan er um at menna vinnulív okkara. Og her er eisini talan um tiltøk, ið kunnu fremja útflutning okkara.

Menningarstovan hevur tí sett upp eina lista yvir hugskot til fimm ymiskar handilsferðir í ár. Í 2005 verður sostatt møguligt at gera handilsferðir til Estland, Reykjavík og Boston, London, Russland og heilt eystur til Kina. Høvuðstankin við hesum ferðum er at fáa í lag ella menna samstarvið, m.a. innan KT-vinnuna og fiskivinnuna.

Í London hava fleiri føroyingar funnið stevið innan sniðgeving. Og verður ferðin til London veruleiki er endamálið at matcha føroyskar kreativar vinnur og kreativar føroyingar í London. Haraftrat skal eina fáa fatur á og troyta møguleikarnar fyri handli annars.

Í Russlandi er endamálið at staðfesta tað handilsliga perspektivið. Her skal kannast møguleikin fyri at føroyskar tænstufyritøkur kunnu servisera russisk fiskiskip.

Og í Kina er endamálið at lata upp fyri møguleikum at keypa og selja fisk, og at fáa íblástur til effektivisering av framleiðsluni í Føroyum.

Vanliga verður skipað fyri tveimum slíkum ferðum um árið. tí verður spennandi at síggja hvagar leiðirnar bera í ár. Spennandi verður at fylgja við í, hvussu tað føroyska vinnulívið fer at megna tær stóru avbjóðingarnar í framtíðini.

**sb.**

Føroyingar:

# Sálarliga fріskari enn onnur

**Heri Kragesteen, sálarfrøðingur á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, heldur ikki, at føroyingar eru so strongdir sum íbúgvarnir í grannalondum okkara**

SÁLARSJÚKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, heldur ikki, at føroyingar eru sálarliga verri fyri enn fólk úr øðrum londum*

Hagtøl vísa, at føroyingar ikki eru verri fyri enn onnur. Men gongdin í øðrum londum er skjót tann skeiva vegin, tá tað kemur til sálarligar trupulleikar.

– Eg haldi ikki, at tað er vist, at vit hava líka ilt í sálini, sum útlendingar ella tey í grannalondum okkara, sigur Heri. Hann heldur fram, at tað enn ikki tykist sum at føroyingar renna líka skjótt sum útlendingar.

– Vit hava mangan skund, og alt skal ganga skjótt fyri seg, men enn er tað ikki so galið sum í útlondum, sigur Heri Kragesteen og leggur afturat, at tað kann vera ein spurningur um tíð, tí føroyingar hava lyndi til at duga væl at taka óvanar aðrastaðni frá til sín.

## Ongin skomm

Fyrr varð tað dult sum mansmorð, um ein persónur varð raktur av depressión ella av øðrum sálarligum trupulleikum. Sum so nógv onnur viðkvom evni, var hetta ikki nakað, sum ein tosaði nakað serligt um. Hetta er við at broytast í dag, og tað merkist aftur innan sálarliga viðgerðarøkið.

Heri Kragesteen, sálarfrøðingur, heldur ikki, at sálarligir trupulleikar eru so tabuaðir í dag sum fyrr.

– Tað er ikki skomm í dag at hava sálarligar trupulleikar. Fólk eru eisini sum heild nógv betur upplýst í dag, sigur Heri Kragesteen. Hann heldur fram, at upplýsingararbeiðið bæði í fjølmiðlum og aðrastaðni um, hvat fyri hjálp er at fáa, ger eisini sítt til, at fólk eru skjótari at søkja um hjálp.

## Depressión vanligast

Av teimum sálarsjúku, sum verða løgd inn á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, eru nógv tey flestu løgd inn orsakað av depressión.

– Depressión verður í útlondum skýrd at vera tann nýggja fólkasjúkan, og tað er ongin orsøk til at halda, at tann tendensurin ikki fer at speglast aftur í okkara samfelag, sigur Heri.

Psykiatriøkið í Føroyum er annars voksið sera nógv seinastu árini. Inntil fyri seks árum síðani arbeiddi bert tann eini sálarfrøðingurin á deildini á Landssjúkrahúsinum. Í dag eru tey fýra. Tey eru í ferð við at byggja eina økispsykiatri upp, og eina til børn og ungdóm. Til hetta seinna væntar Heri, at tað verður ein sálarfrøðingur, sum kemur at taka sær av tí burturav.